# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

## Teir ungu reistust

*Eftir stórtapið móti Danmark ressaðust teir á U-16 landsliðið okkara, og við eitt sindur av hepni ella einum vinarligari dómara, hevði talan allarhelst verið um stig móti finnlendingum*



*Fagnaðurin var øgiligur, eftir at Bjarni Jørgensen hevði langað bóltin fram við finska málverjanum*
***Mynd: Jonhard Hammer***

Jákup Mørk

NM fyri U-16 landslið
Føroyar-Finnland 1-2 (1-2)

Eftir stórtapið móti dønum, vóru kanska fleiri av áskoðarunum, sum óttaðust, at talan skuldi gerast um enn eitt skræds móti finnlendingum.

Í dystinum móti Onglandi sýndu finnar til tíðir heilt gott spæl, og kanska mest av øllum sýndu teir, at teir vóru rættuliga væl fyri kropsliga. Júst hetta seinna var kanska størsti veikleikin á føroyska liðnum, og tá talan so eisini var um dyst tveir dagar upp í slag, var kanska eisini orsøk at óttast enn einum tennis tapi.

### Málið var eftir bókini

Soleiðis gjørdist tó ongantíð, og hetta komst í stóran mun av tí hugburði, sum føroysku leikararnir sýndu.

Frá fyrsta bríksli royndu teir at spæla fótbólt, og tað eydnaðist eisini at fáa spælið at hanga nógv betri saman, enn tað gjørdi í fyrra dystinum.

Finnar royndu hinvegin at leggja stórt trýst á føroyska liðið, men hóast teir eisini fingu eitt mál rættuliga skjótt, tá teir sluppu at leggja innfyri úr høgru, so skakaði hetta als ikki føroyska liðið.

Tvørtur ímóti megnaðu føroyingar at svara aftur við einum máli, sum var at kalla tikið úr eini fótbóltslærubók:

Finnar mistu bóltin tá teir vóru komnir nakað inn á føroysku hálvuna, og so gekk skjótt. Miðframherji okkara dróg nakað oman at taka ímóti bóltinum. Finska miðverjan fylgdi fram við, og so fall revsingin. Ístaðin fyri at spæla beint á áleypparan, varð bólturin sendir flatt út í vinstra borð, og síðani varð ein høg sending løgd inn um finsku verjuna, har Bjarni Jørgensen kom rennandi púra leysur. Við einum dómadagsskoti sendi hann bóltin fram við málverjanum, og so var 1-1. Stórur fagnaður á føroysku áskoðarunum, og sjálvsagt var fagnaðurin á vøllinum ikki minni.

### Óhepnir

Ein kundi kanska roknað við, at at hetta líka sum fót at seta lív í finnar, men hetta hendi als ikki. Ístaðin áttu føroyingar heldur at lagt seg á odda, men einki spurdist burturúr, tá teir fingu stóran møguleika at javna.

At finnar so fingu lagt seg á odda løtu seinni, kunnu teir einamest takka dómaranum fyri. Eftir hornaspark og út frá, royndu teir seg aftur við skoti móti málinum. Hví, skulu vit ikki taka dagar ímillum, men í øllum førum bríkslaði dómarin fyri finskum brotssparki. Møguliga fyri hond á bóltinum, men í øllum førum varð brotsspak úrslitið av hesum.

Arnfinn í Bartalsstovu bjargaði fyrstu atsókníni frá ellivu metrum, men tá tríggir finnar og eingin føroyingur fylgdu upp, var málverjin prísgivin.

Tað tænir tó føroysku leikarunum til rós, at teir kortini ikki fullu í fátt. Í tveimum atløgum var heilt nær við, at Rasmus Nolsøe javnaði finsku leiðsluna, men eydnan var so als ikki við tvørámanninum við vælkenda eftirnavninum. Fyrst fekk málverjin akkurát jústað bóltin upp um samankomingina eftir beinleiðis fríspark úr 20 metrum, og síðani heilfluktaði Rasmus úr góðari støðu, men beint upp um.

### Orkan rakk

Nærri komu føroyingarnir ikki í fyrra hálvleiki, og tó at ikki gjørdust heilt so vandamiklir í seinna, so hildu teir allan dystin á at spæla fótbólt, og fleiri ferðir komu teir sær eisini í góðar støður. Serliga tá spælt varð ígjøgnum í síðunum, har mótstøðumenninir ofta tóktust tunnir í verjupartinum.

Hin vegin áttu finnlendingar sjálvsagt eisini sínar møguleikar, men men í flestu førum fekk føroyska verjan seinasta fótin á, og gekk heilt galið, stóð málverjin eisini har hann skuldi.

Júst hetta, at føroyingarnir veruliga sýndu vilja og dirvi at spæla, var mest positiva upplivingin í dystinum, sæð frá einum føroyskum sjónarhorni. Uttan at gera spælið torførari enn tað veruliga er, megnaðu teir í fleiri førum at halda bóltin í egnari røð, soleiðis at mótstøðumenninir eisini finu loyvi at renna eftir okkara.

Merkisvert var eisini, at orkan hjá føroyingunum hesu ferð rakk til allar 80 minuttirnar. Kanska fyrst og fremst grundað á, at finska spælið við nógvum longum sendingum viðførdi, at tað í størri mun enn móti dønum bar til at »standa rætt«, soleiðis at at sparast kundi eitt sindur upp á renningina.

### Niðurstøðan er positiv

Alt í alt boðaði avrikið týsdagin frá nógv meira góðum enn ringum fyri framtíðina hjá føroyska landsliðsfótbóltinum.

Eins og móti dønum kann framvegis staðfestast, at tekniskt og taktiskt eru føroyingarnir nú væl betri fyri á ungum árum. Hinvegin halta vit enn nakað, tá talan er um kropsligu styrkina og skjótleikan.

Hvussu úrtøkan verður, tá Ongland hósdagin verður mótstøðuliðið, er sjálvsagt ilt at spáa um.

Megna føroyingar at nýta sinniliga yvirskotið, sum dysturin móti Finnlandi ehlst skal hava givið teimum, á rættan hátt. Ja, so kann talan gerast um enn eitt sera gott føroyskt úrslit.

Hinvegin er av alstórum týdningi, at góða avrikið ikki hevur havt tað árin, at leikararnir nú kenna seg sum heimsmeistarar. Vit skulu minnast til, at vit í altóða fótbólti altíð fara at teljast millum tey smáu, og at tað tí er alneyðugt, at spælararnir geva alt teir orka hvørja ferð farið verður á vøllin.

Vónandi gera okkara dreingir eisini tað, tá Ongland hósdagin er mótstøðuliðið.



*Tá sæð verður burtur frá kropsligu styrkini, stóu føroysku leikararnir einki aftan fyri teir finsku*
***Mynd: Jonhard Hammer***

## Verður helst útselt

*Forsølan av atgongumerkjum til landsdystin á Tórsvølli 16. august millum Føroyar og Danmark gongur avbera væl, og longu nú eru heili 1500 atgongumerki seld*

Stefan í Skorini

Í Fótbóltssambandinum fegnast tey sum vera man um søluna, tí at hetta kann gerast ein veruligur fongur hjá FSF fíggjarliga. Tað er Postverk Føroya, sum stendur fyri søluni.

- Tað er ikki vist, at øll, sum vilja, sleppa at síggja dystin, tí at sum sølan gongur nú, vænta vit, at tað verður útselt. Vit hava longu selt eini 1500 atgongumerki, sigur Ísak Mikladal úr FSF.

Tá havt verður í huga, at tað eru tvær vikur til dysturin verður, so er hetta heilt óvanligt í Føroyum. Tórsvøllur tekur ikki fleiri enn 6000 áskoðarar, men ta síðstu vikuna uppundir dystin verða flest atgongumerki seld, so væntast kann, at tað verður eitt fult stadion, sum stendur fyri donsku leikarunum, tá ið teir koma til Føroyar. Føroysku spælararnir hava eisini brúk fyri góðum stuðli frá áskoðarafjøldini, um teir skulu fáa eitt gott úrslit ímóti dønum.



Enn hevur Tórsvøllur ongantíð verið fullsettur, men eftir øllum at døma verður hetta fyrstu ferð. So um ein ætlar sær til dystin, so er ikki at liggja sjóvarfallið av sær, men ogna sær eitt atgongumerki beinanvegin.

## Avboð úr Italia

*Líkt er ikki til, at donsku landsliðsleikararnir, sum dagliga spæla í Serie A í Italia, verða at síggja í dystinum ímóti Føroyum*

Stefan í Skorini

Bæði Martin Laursen og Martin Jørgensen eru framvegis plágaðir av skaðum í lærkrikanum, sum teir eisini drógust við undir EM-endaspælinum í summar.

Martin Laursen, sum spælir í verjuni hjá Verona, men eftir øllum at døma fer til Parma næsta kappingarár, er júst farin at venja aftur, men rennur bara enn, og hann roknar sjálvur ikki við, at hann verður klárur til dystin ímóti Føroyum.

Martin Jørgensen, sum vanliga er at síggja á høgra vongi og dagliga spælir í Udinese, er enn ikki sloppin av við skaðan í lærkrikanum, sum gjørdi, at hann ikki kundi verða við í øllum dystunum í EM.

Thomas Helveg úr AC Milan, sum heldur ikki var heilt klárur undir EM-endapælinum, hevur fingið ein nýggjan lærskaða. Hetta er tó ikki sami lærskaði, sum darvaði honum í EM.

Liðfelagin hjá Martin Jørgensen í Udinese, Morten Bisgaard, er eins og hinir í Italia júst farin aftur at venja, av tí at landskappingin ikki byrjar aftur fyrr enn 1. oktober. Hann verður tí ikki í nóg góðari venjing til dystin, og tí er líkt til, at eingin av donsku landsliðsleikarunum, sum spæla í italsku Serie A, verða við í landsdystinum ímóti Føroyum 16. august á Tórsvølli.

*U-16 landsliðið, søgan:*

## Evnini eru tíðliga sjónsk

Hjá føroysku fótbóltsspælarum, sum hava verið á U-16 landsliðnum munnu royndirnar hava verið bæði góðar og minni hugaligar. Talan hevur sjálvsagt verið um bestu fótbóltsspælararnar í landinum. Í heimligu kappingini hava teir staðið seg væl og næstan gjør, sum teir hava vilja. Tá teir hava verið á landsliðnum og spælt í NM, hava tapini ofta verið ógvuslig, og tað hevur ikki verið hugaligt.

Aftaná er tað ivaleyst hugaligt at minnast aftur á, at fleiri av evnaríkku mótstøðumonnunum eru vorðnir kendir fótbóltsspælarar í fremstu røð í europeiskum stórfeløgum. Talan hevur verið um nógvar.

Alvi Justinussen, sum í mong ár var í miðverjuni hjá GÍ, og sum nú spælir á 2. deildarliðnum hjá ÍF, var við í Ísalndi í 1984. Setningurin hjá honum á Akureyri tann 2. juli var at ansa eftir miðframherjanum hjá dønum, sum æt Brian. Longu tá vóru øll eyguni vend móti hesum Briani. Hann hevði Laudrup til eftirnavn, og pápin og stóribeiggin høvdu víst, at fótbóltsevnini í familjuni vóru framúr. Fleiri stórfeløg í Europa vóru longu tá til reiðar at rinda milliónaupphæddir fyri snillingin. Brian spældi í Brøndby, áðrenn hann fór í europeisku stórfeløgini at spæla.

Í 1994 var NM kapping í Danmark. Jógvan Martin Olsen var venjari hjá føroyska liðnum: - Vit spældu ikki ímóti Onglandi. Men vit sóu teir í finaluni spæla móti Eysturríki. Vit løgdu beinan vegin til merkis ein av álopsspælarunum hjá Onglandi. Hann var framúr skjótur og evnaríkur, og síðani hava vit sæð, at talan var um stórspælarar. Hann eitur Michael Owen og spælir í Liverpool og á enska landsliðnum.

Í 1997 var kappingin í Vasa í Finnlandi. Føroyar taptu 4-1 móti heimaliðnum. Millum mótstøðumenninar var Mikael Forssell. Hóast hann er føddur í 1981, so hann longu í fjør á altjóða stjørnuliðnum hjá Chelsea.

Í somu kapping taptu føroyingar 10-0 móti Onglandi. Í 47. minutti var Joe Cole skiftur inn á enska liðið. Hann var longu tá bundin av sáttmála við West Ham United, har hann i fjør var týdningarmikil spælari. Føroyingar hoyrdu í Finnlandi, at Manchester United hevði boðið West Ham 25 milliónir fyri hann.

Ivaleyst eru fleiri framtíðar stjørnur í Gundadali í hesum døgum. Tí er tað ikki burturvíð at goyma leikskránna. Komandi árini fer tað at bera til at staðfesta, um summir av ungu monnunum gerast stórspælarar í kendu europeisku feløgunum. At teir eru úttiknir at umboða U-16 landsliðið ber boð um, at evnini eru góð. Hvussu evnini verða brúkt valdast m.a. um sinniligu styrkina og hepni. Hvussu tað verður við tí, fer bara tíðin av vísa.

JH

## Toyota Cup á Argjum

*AB tekur nú táttin upp aftur, og fer í næstum at skipa fyri Toyota Cup 2000 fótbóltskapping á vøllinum á Argjum*

Heini í Skorini

Fyri nøkrum árum síðan skipaði AB fyri summarkapping í fótbólti á grúsvøllinum á Argjum, har øll fótbóltsáhugað kundu luttaka, men av tí at farið var undir at gera grasvøll, kom steðgur í hetta tiltak. Men nú er ætlanin aftur at fara í gongd við hesa kapping, um nóg nógv melda seg til. Ætlanin er, at kappingin skal vera frá 11-13 august 2000.

Aldursbólkarnir ið kunnu luttaka eru pinkur, gentur 10-12 ár, smágentur, gentudeildin, kvinnudeildin, minipiltar, smápiltar, piltar, smádreingir, dreingir og unglingar.

Leikt verður á hálvum vølli, minipiltar leika á 1/4 vølli. Málini er smápiltamál, meðan leikt verður 2 x 10 minuttir, og møguleiki er at melda seg til sum einstaklingur og sum lið.

Vinnandi liðið fær steyp og medaljur til ognar, meðan nr. tvey og trý fáa medaljur. Luttøkugjaldið er 300 kr. fyri liðið, og tilmelding fer fram á tlf. 284142 og 315476. Síðsta freist at melda seg til Toyota Cup 2000 er 7. august.

STØÐUGT FLEIRI HALDA Sosialin
WWW.SOSIALURIN.FO
Tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64
Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:
☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.